# Varaleiðari til

FK

# í Dr. Jakobsensgøtu

Vit sóknast eftir varaleiðara at byrja 1. mars ella eftir nærri avtalu.

**Vit kunnu bjóða tær:**
…eitt spennandi starv, har tú fært høvi til at vísa tíni evnir og hugflog,
…ein handil, við góðum rakstri og nógvum spennandi møguleikum,
…eitt gott og lívligt arbeiðsumhvørvi,
…løn eftir avtalu og m.a. førleika.

**Vit vænta okkum av tær:**
…kanst hava ábyrgd av at handilin altíð er til reiðar at taka ímóti kundum,
…kanst standa á odda og menna starvsfólkaliðið í handlinum,
…kanst skipa fyri góðari kundarøkt,
…dámar at taka av avbjóðingum og hava nógv at gera,
…sjálvstøðug/ur, ábyrgdarfull/ur og kanst skifta millum arbeiðsuppgávurnar í handlinum,
…hevur kunnleika til handilsyrkið.

Meira fæst at vita um starvið, við at støkka inn á gólvið ella ringja á tlf. 311320 ella 217593 og spyrja eftir leiðaranum Bo Møller.

Umsókn skal vera okkum í hendi innan **9. februar 2002** og stílast til:

**FK-Tórshavn**
Att.: Bo Møller
Dr. Jakobsensgøta 6
Boks 349 · 110 Tórshavn

**Keypssamtøkan**
**Dr. Jakobsensgøta**

# Roknskaparfólk

Fyri einum av kundum okkara – eitt framleiðsluvirki í Tórshavn – søkja vit eftir einum fíggjarleiðara/bókhaldara at byrja skjótast gjørligt.

Arbeiði umfatar:
- fíggjarstýring
- fíggjarætlanir
- bókhald
- lønarroknskap
- tollavgreiðsla
- umframt annað skrivstovuarbeiði

Tann, sum settur verður í starv, skal kunna arbeiða sjálvstøðugt. Praktiskar royndir eru tí ein fyrimunur.

Løn sambært avtalu.

Umsóknir skulu í seinasta lagi 9. februar 2002 sendast til P/F Grannskoðarafelagið Rasmussen & Weihe, sum eisini kann geva nærri upplýsingar um starvið.

**RASMUSSEN & WEIHE**
Statsautoriserað grannskoðarafelag P/F
**An associated firm of** PRICEWATERHOUSECOOPERS

Á Glaðsheyggi
P.O. Box 30
FO-110 Tórshavn
Tlf. (+298) 311017
Fax (+298) 311018

Sp/f nr. 267
e-mail:
rasmussen@rasmussen.fo
Http://www.rasmussen.fo

# Fótbóltsvenjaraskeið – er tað nakað fyri teg?

Fótbóltssamband Føroya skipar í samstarvi við feløgini fyri grundskeiðum í fótbóltsvenjing í februar og mars 2002.

| Dagur | Skeið | Stað |
|---|---|---|
| 1. – 2. feb. | A – Byrjunarvenjing | Gøta |
| 15. – 16. feb. | B – Fysisk venjing | Toftir |
| 22. – 23. feb. | D – Teknisk venjing | Tórshavn (HB-húsið) |
| 1. – 2. mars | C – Venjarastarvið | Fulgafjørður |
| 8. – 9. mars | E – Taktisk venjing | Tórshavn (B36-húsið) |

Hvørt skeiðið er 12 tímar (vanliga fr. kl. 18-21 og ley. kl. 9-18). Neyðugt er at hava lokið skeið A – Byrjunarvenjing fyri at kunna luttaka á hinum skeiðunum. Aldursmarkið er 15 ár.

**Instruktørar:** *Bjørn Krog, Eli Hentze, Jógvan Martin Olsen og Petur Simonsen.*

**Tilmelding:** Áhugaði kunna sjálvi boða frá luttøku til FSF ella gjøgnum egið felag.

**Tilmeldingin skal vera skrivlig** (brævi, faxi ella telduposti).

Freistin at boða frá luttøku er úti 7. februar – tó er tilmeldingarfreistin fyri skeið A úti 29. januar.

FSF skilar sær rætt til at velja burtur úr, um ov nógvir luttakarar eru til okkurt av skeiðunum – í mesta lagi 24. Hvørt skeiðið er treytað av nóg góðari undirtøku – í minsta lagi 10.

**Luttøkugjald:** Skeið A 100 kr., hini skeiðini 150 kr. fyri hvønn luttakara.

Meira fæst at vita um skeiðini at venda sær til FSF-skrivstovuna.

**Fótbóltssamband Føroya**
Gundadalur • Boks 3028 • FO–110 Tórshavn
tlf. 316707 • fax. 319079
t-postur: gudrid@football.fo

formula XEROX
ATLANTIC AIRWAYS

# Suðurstreymoyar Javnaðarfelag

# Uppstillingarfundur

2. og 3. uppstillingarfundur til løgtingsvalið verður mikukvøldið 6. februar kl. 19.30.

Fundurin verður í hølunum hjá Starvsmannafelagnum í J. H. Schrøtersgøtu 9.

**Nevndin**

TVØROYRAR KOMMUNA

# Frá Frítíðarskúlanum í Trongisvági

Nú byrjar innskriving av børnum til skúlaárið 2002/2003. Seinasta freist er fríggjadagin 1. mars.

**Frítíðarskúlin, tlf. 372750**

# Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Toyota Avensis 1,8
**Árg.:** 1999
**KM.:** 38.834

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Heri Weihe, sýnsmaður
tlf. 345729 · fax 345607
at hitta: mánadag-hósdag kl. 08.30-10.00
og fríggjadag 08.00-16.00

Sosialurin
Lesið Sosialin – tað loysir seg



# BÓKHALDARI
## til Griffilin

Vit sóknast eftir einum fólki, sum kann taka sær av okkara bókhaldi, ið ikki er so stórt - uml. 10 tímar um vikuna.

Ein treyt er, at tú kemur her í handilin at gera arbeiðið og tú mást duga at brúka bókhaldsskipanina NAVISION.

Send okkum eina skrivliga umsókn við møguligum prógvum og tilmælum.

griffilin
SMS • TEL 310840

# SØLUFÓLK
## til hvítvørudeildina

**Køksmiðstøðin søkir eftir sølufólki at byrja beinanvegin.**

Vit kunnu bjóða tær eitt áhugavert starv í einum spennandi og fjølbroyttum umhvørvi. Løn og treytir verða ásettar í samsvari við útbúgving og royndir.

Vit vænta, at tú ert ágrýtin, stinn/ur, dugnaligur og dugur at veita viðskiftafólkum okkara eina góða tænastu.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi innan 15. feburar 2002 og skal sendast til:

Køksmiðstøðin
Á Hálsi
110 Tórshavn
att: Vinjard Johannesen

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsing um starvið fæst við at seta seg í samband við Vinjard Johannesen, leiðara.

HTH Elkeyp **Køksmiðstøðin**
Á Hálsi • FO-100 Tórshavn • Tel. 31 49 49 • Fax 31 13 30

# Søkt verður eftir bakara

Ert tú ágrýtin og hevur áhuga í avbaking, kanst tú hjálpa til at tilrættaleggja arbeiðið og kanst átaka tær ábyrgd, kunnu vit bjóða eitt spennandi starv við framtíðarmøguleikum.

Meira fæst at vita um starvið við at ringja á tlf. 314456 ella 214456 og spyr eftir Per Poulsen.



**Sp/f Mylnan**
Berjabrekka 1
100 Tórshavn

**Í dag eru niðanfyri standandi partafelag undir tvingsilsavtøku strikað úr partafelagsskránni:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 1987, Sp/f Hjá Mariu, 700 Klaksvík.

Í dag eru niðanfyri standandi partafelag undir trotabúarviðgerð strikað úr partafelagsskránni:

Skrásetingar-nr. Sp/f 2802, Sp/f Viktor, 188 Hoyvík.

Í dag eru niðanfyri standandi feløg í likvidation strikaði úr partafelagsskránni:

Skrásetingar-nr. P/F 1499, P/F Núpsdalur, 220 Skálavík.
Skrásetingar-nr. Sp/f 2488, Sp/f Sjóstjørnan, 600 Saltangará.
Skrásetingar-nr. P/F 2658, P/F Industry Supply, Ltd, 100 Tórshavn.

Skráseting Føroya, tann 01.02.2002.

Kristin Balle

Lesið Sosialin

# Ferðavinnan í Eysturoynni

Aðalfundurin hjá Ferðavinnuni Í Eysturoy verður týsdagin hin 19. februar 2002. Tíð og fundarstaður verða lýst seinni.

**Ferðavinnan í Eysturoy**

FØROYA LANDSSTÝRI
**LØGMANSSKRIVSTOVAN**

# Fulltrúar/løgfrøðingar

Løgmansskrivstovan søkir við hesum eftir fulltrúum/løgfrøðingum.

**Uppgávur**
Arbeiðsuppgávurnar eru fjølbroytt løgfrøðiligt arbeiði so sum gerð av løgfrøðiligum responsa, eftirkanning av lógaruppskotum hjá miðfyrisitingini og aðrar løgfrøðiligar uppgávur, eitt nú menning og samskipan av lóggávuarbeiðinum í miðfyrisitingini, og løgfrøðiligar arbeiðsuppgávur, ið standast av málinum um ríkisrættarligu støðu Føroya.

**Faklig førleikakrøv**
Sett verður sum krav, at umsøkjarar hava løgfrøðiligt embætisprógv. Tó kunnu eisini tey søkja, ið væntandi verða liðug við slíka útbúgving komandi summar.

**Persónlig førleikakrøv og royndir**
Umsøkjarar skulu hava góð samstarvsevni, vera áhitnir, miðvísir, kunna arbeiða sjálvstøðugt og vera til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar við atliti til, at roknast kann við stórum broytingum á økinum næstu árini. Umsøkjarar skulu harumframt hava góðan kunnleika til føroyskt mál.

**Løn og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Búskapar- og løgfrøðingafelag Føroya. Setanarøkið fevnir um Løgmansskrivstovuna við tilhoyrandi stovnum og aðalstýrini.

**Vit kunnu bjóða**
Talan er um eitt fakliga krevjandi starv við nógvum avbjóðingum og við sera góðum møguleikum fyri eftirútbúgving.

**Nærri upplýsingar um starvið**
Møguligir umsøkjarar eru vælkomnir at seta seg í samband við Rúna Joensen, deildarstjóra, tlf. 351010, fyri at frætta meira um starvið.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, c.v. og møguligum viðmælum skulu sendast

Løgmansskrivstovuni
Postsmogu 64
110 Tórshavn

Umsóknir skulu vera á Løgmansskrivstovuni í seinasta lagi 12. februar 2002 kl. 16.00. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Løgmansskrivstovan er fyrisiting hjá løgmanni og varaløgmanni. Løgmansskrivstovan er skipað í tríggjar deildir og tvær tænastueindir og hevur í høvuðsheitum tvørvegis og samskipandi uppgávur, eitt nú landstýrisfundir, uttanlandsmál, umboðan, starvsfólkapolitikk, fyrisiting, nýskipan og sjálvstýrismál.

# Hús/íbúð ynskist

Vegna eitt av starvsfólkum okkara søkja vit eftir hampuliga stórari íbúð ella húsum í Tórshavn ella nærhendis.

VW Audi
**Bilasølan v/ Øssur Johannesen**
Tlf. 315354

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!